LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Arbeiðs- og Brunaeftirlitið
Undir Bryggjubakka 27
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 18. august 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/01251, 25/06200, 25/07541, 25/08634
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við arbeiðsskaðamál

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt fýra klagur um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum sum skrivstovu í sambandi við arbeiðsskaðamál. Málini høvdu verið virkin í meir enn 2,5 ár, uttan at endalig avgerð ella fyribilsavgerð var tikin. Harumframt høvdu klagararnir í fleiri umførum ikki fingið svar ella afturboðan til fyrispurningar sínar. Eisini sást drál í málsupplýsingini í sambandi við eitt hoyringssvar og ófullfíggjað skjalføring. Umboðsmaðurin heldur hetta als ikki vera nøktandi og gevur samanumtikið Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av teimum fýra arbeiðsskaðamálunum.*

## 2. Klagurnar

Í tíðarskeiðnum 14. januar 2025 – 26. mars 2025 móttók umboðsmaðurin fýra klagur um vantandi svar og málsviðgerðartíðina hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við mál um arbeiðsskaða, sum allar verða viðgjørdar í hesum áliti, sum ávikavist klaga 1, 2, 3 og 4.

Umboðsmaðurin endurgevur her einans teir partar av klagunum, ið umboðsmaðurin metir vera viðkomandi fyri klagumálsviðgerðina.

**Klaga 1**
Við skrivi, dagfest 14. januar 2025, sendi A umboðsmanninum klagu um málsviðgerðartíðina hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð.

> Klagarin greiddi í klagu sín frá, at arbeiðsskaðin hendi tann 10. mai 2021. Tá umleið sjey vikur vóru farnar, væntaði hann at hoyra frá Føroya Vanlukkutryggingarráð, og at hann nú hevði verið knýttur at sjúkrahúsverkinum í meira enn trý ár. Eisini upplýsti klagarin, at tá hann hevði roynt at fingið fatur á ráðnum, ber tað ikki til.

**Klaga 2**
Við skrivi, dagfest 28. februar 2025, sendi Havnar Arbeiðarafelag vegna lim umboðsmanninum klagu um vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð.

> Klagarin greiddi í klagu síni frá, at arbeiðsskaðamálið varð latið Føroya Vanlukkutryggingarráð tann 20. desember 2023, og at klagarin seinastu mánaðirnar til fánýtis hevði roynt at fingið svar til mál sítt. Klagarin metti tað ikki vera í samsvar við vanligar fyrisitingarreglur, at hann ikki fekk nøktandi svar til fyrispurningar sínar.

Viðlagt klaguni var avrit av samskifti millum klagaran og Arbeiðs- og brunaeftirlitið í tíðarskeiðnum desember 2023 – februar 2025.

**Klaga 3**
Við skrivi, dagfest 14. mars 2025, sendi B vegna kunda umboðsmanninum klagu um málsviðgerðartíðina og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð.

> Klagarin greiddi í klagu síni frá, at hann í 2,5 ár hevði bíðað eftir støðutakan til arbeiðsskaðamálið, hóast hann hevði roynt at fingið eina endaliga avgerð. Harumframt hevði hann biðið um, at skaðarakti fekk fyribils endurgjald fyri mist vinnuføri, sambært § 48, stk. 4 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, ella forskot upp á skaðabót fyri varandi mein, sambært § 56, stk. 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini. Klagarin segði seg hvørki fáa málið sett á skrá ella fáa svar. Klagarin metti, at tað var brot á nevndu ásetingarnar í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, og at seinkanin í støðutakanini var hend, síðani umsitingin av Føroya Vanlukkutryggingarráð varð flutt til Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

Viðlagt klaguni var avrit av samskifti millum klagaran og Arbeiðs- og brunaeftirlitið í tíðarskeiðnum november 2024 – mars 2025.

**Klaga 4**
Við skrivi, dagfest 26. mars 2025, sendi D umboðsmanninum klagu um málsviðgerðartíðina hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð.

> Klagarin greiddi í klagu síni frá, at hann hevði verið fyri arbeiðsskaða í juli 2022, og at hann síðan tá hevði verið í eini langari tilgongd við Arbeiðs- og brunaeftirlitið og egnum lækna. Hann hevði verið til fleiri støðumetanir og segði seg hava fingið at vita fleiri ferðir, at hetta

> varð tann síðsta støðumetanin. Hann segði seg hava verið til seinastu støðumetanina í desember 2024, sum var 2,5 ár eftir arbeiðsskaðan. Hann helt tilgongdina vera langa og óprofessionella. Hann segði seg eisini hava ringt fleiri ferðir fyri at fáa kunning um status, og nær næsti fundur fór at verða, men fekk einans at vita, at tey ikki vistu, nær næsti fundur fór at verða, ella at hann skuldi fáa boð um, nær næsti fundur fór at verða, ella at ongin visti. Hann segði seg hava ringt ein hósdag beint eftir kl. 12 fyri at vita, nær næsti fundur fór at verða. Fekk tá boð um, at telefontíð var millum 10 og 12, sum hevði við sær, at hann var noyddur at bíða til vikuna eftir fyri at ringja og seta sama spurning. Hann segði seg hava ringt síðst í februar 2025 og rykt eftir eini avgerð, har hann fekk upplýst, at næsti fundur fór at verða í mars 2025. Tá hann so ringdi aftur síðst í mars, sum var tvey ár og nýggju mánaðir eftir, at arbeiðsskaðin hendi, fekk hann at vita, at tey framvegis ikki vistu, nær næsti fundur fór at verða.

Viðlagt klaguni var avrit av samskifti millum klagaran og Arbeiðs- og brunaeftirlitið í tíðarskeiðnum mai 2024 – november 2024.

## 3. Skipanin og lógargrundarlagið

Arbeiðs- og brunaeftirlitið yvirtók við tveimum skeringsdøgum, 6. november 2023 og 1. januar 2024, umsitingina av Føroya Vanlukkutryggingarráð frá Sorinskrivaranum í Føroyum. Øll virkin mál vórðu yvirtikin samstundis. Skipanin virkar soleiðis, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið virkar sum skrivstova hjá Vanlukkutryggingarráðnum, umsitur skjøl í málunum og ger tilmæli til Føroya Vanlukkutryggingarráð, sum tekur avgerð í málunum. Fyrispurningar um mál verða eisini svaraðir av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, sum skrivstova fyri Vanlukkutryggingarráðið.

Føroya Vanlukkutryggingarráð tekur avgerð í arbeiðsskaðamálum, sambært Arbeiðsskaðatryggingarlógini (løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 25. mars 2025).

Endurgjald fyri mist vinnuføri verður, sambært § 47 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, veitt soljóðandi:

> § 47. Hevur arbeiðsskaðin ella vinnusjúka sbrt. § 10, stk. 1, ið er góðkend sbrt. § 10, stk. 2, havt við sær minkandi førleika hjá tryggjaða ella persóni, sum er umfataður av Vinnusjúkugrunninum, at forvinna sær inntøku við arbeiði, hevur viðkomandi rætt til endurgjald fyri mist vinnuføri. Endurgjald verður tó ikki veitt, um óvinnuførið verður ásett til minni enn 15%.
> *Stk. 2.* Tá mett verður um miss av vinnuføri, skal leggjast uppfyri, um tryggjaði ella persónur, sum er umfataður av Vinnusjúkugrunninum, hevur møguleika at útvega sær inntøku við tílíkum arbeiði, ið rímiligt er at krevja av honum eftir førimuni, útbúgving, aldri og møguleikunum fyri vinnuligari endurútbúgving og uppvenjing.

Avgerðarfreistirnar eru, sambært § 48 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, soljóðandi:

§ 48. Tá ið tað eftir sjúkuviðgerð, uppvenjing o.a. er grundarlag fyri at meta um framtíðar heilsustøðu og arbeiðsmøguleikar hins tryggjaða, ger Vanlukkutryggingarráðið av, um viðkomandi hevur rætt til endurgjald fyri mist vinnuføri.
*Stk. 2.* Avgerðin eftir stk. 1 skal um møguligt takast innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina um arbeiðsskaðan ella vinnusjúkuna.
*Stk. 3.* Forskot upp á endurgjald fyri mist vinnuføri kann veitast tryggjaða. til endalig avgerð er tikin sambært stk. 2.
*Stk. 4.* Er greiða ikki fingin á arbeiðs-viðurskiftum hins tryggjaða innan 2 ára freistina í stk. 2, skal Vanlukkutryggingarráðið játta tryggjaða eitt fyribils endurgjald fyri mist vinnuføri.

Upphædd og útgjalding fyri mist vinnuføri verður veitt, sambært § 49 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Endurgjald fyri varandi mein verður, sambært § 55 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, veitt soljóðandi:

§ 55. Hevur tryggjaði fingið varandi mein av arbeiðsskaðanum ella av vinnusjúkuni, sbr. § 10, stk. 1, verður veitt ein skaðabót, um meinstigið er 5% ella hægri.
*Stk. 2.* Meinstigið verður ásett við grundarlagi í læknafrøðiligari meting um slagið og støddina av arbeiðsskaðanum og við atliti at, hvussu hesi hava ávirkað persónligu tilveruna hjá viðkomandi.

Avgerðarfreistirnar eru, sambært § 56 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, soljóðandi:

§ 56. Tá ið tað eftir sjúkuviðgerð, uppvenjing o.a. er grundarlag fyri at meta um framtíðar heilsustøðu hins tryggjaða. ger Vanlukkutryggingarráðið av, um tryggjaði, hevur rætt til skaðabót fyri varandi mein.
*Stk. 2.* Avgerðin eftir stk. 1 skal, um tilber, takast innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina um arbeiðsskaðan.
*Stk. 3.* Forskot upp á skaðabót fyri varandi mein kann veitast tryggjaða til endalig avgerð er tikin samsvarandi stk. 1 og 2.

Upphædd og útgjalding fyri varandi mein verður veitt, sambært § 57 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

## 4. Broytingar í skipanini

Fram til 25. mars 2025 var § 27, stk. 1 – 3 í arbeiðsskaðatryggingarlógini soljóðandi:

"§ 27. Vanlukkutryggingarráðið er mannað við einum dómara frá Føroya Rætti sum formanni umframt 4 nevndarlimum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir, har ið ein teirra skal vera útbúgvin lækni og verða tilnevndur eftir tilmæli frá Landslæknanum, fyri 4 ár í senn. Harumframt velur landsstýrismaðurin 3 varalimir fyri 4 ár í senn.
*Stk. 2.* Limir og varalimir í Vanlukkutryggingarráðnum mugu ikki starvast hjá ella taka lut í leiðsluni í tryggingarfelag, sum teknar arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, ella vera limur í ella starvast í Vinnusjúkugrunninum.

> *Stk. 3.* Vanlukkutryggingarráðið skal hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv ella annað viðkomandi prógv frá hægri lærustovni."

Við løgtingslóg nr. 40 frá 25. mars 2025 var soljóðandi broyting gjørd í § 27, stk. 1 – 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini:

> "§ 27. Vanlukkutryggingarráðið hevur fimm limir, sum landsstýrisfólkið velur. Forfólkið skal hava lokið løgfrøðiligt embætisprógv, og ein limur skal vera útbúgvin lækni. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, tó so at limur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur. Harumframt velur landsstýrisfólkið ein varalim fyri forfólkið, ein varalim fyri læknan og ein varalim fyri hinar tríggjar limirnar.
> *Stk. 2.* Limir í Vanlukkutryggingarráðnum mugu ikki starvast hjá ella taka lut í leiðsluni í tryggingarfelag, sum teknar arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, vera limur í ella starvast í Vinnusjúkugrunninum ella starvast hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.
> *Stk. 3.* Vanlukkutryggingarráðið skal hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv. Vanlukkutryggingarráðið kann lata skrivaranum heimildir at taka avgerð í ávísum málum, har sum greið siðvenja er. Vanlukkutryggingarráðið skal regluliga kunnast um slíkar avgerðir."

Sambært Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, hevur tað nú fingið víðkaðar heimildir frá Føroya Vanlukkutryggingarráð í sambandi við viðgerð av arbeiðsskaðamálum, sum hevur við sær, at mál ikki longur skulu á fund í Vanlukkutryggingarráðnum, har sum greið siðvenja er.

## 5. Málslýsing og viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Sambært umboðsmanslógini § 6, stk. 2, skulu klagur vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at viðurskiftini áttu sær stað. Sum meginregla viðger umboðsmaðurin tí ikki mál, sum eru svarað og endaliga avgreidd fyri meira enn einum ári undan klaguni til umboðsmannin.

Av tí at mál um arbeiðsskaða vanliga taka um tvey ár at avgreiða, hyggur umboðsmaðurin tó at málsgongdini longur enn eitt ár aftur viðvíkjandi teimum pørtum av klagunum, ið snúgva seg um málsviðgerðartíð.

**Klaga 1**
**Málslýsing**
Av skjølunum, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi umboðsmanninum, sæst, at arbeiðsskaðin varð fráboðaður tann 24. juni 2021, men at málið enn ikki var endaliga avgreitt, tá klagan varð send umboðsmanninum tann 14. januar 2025. Málið var heldur ikki avgreitt, tá umboðsmaðurin móttók skjølini frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum tann 18. februar 2025. Málið hevur sostatt verið virkið í áleið 3,5 ár uttan avgerð, sambært § 47 og 55 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Eisini sæst, at Føroya Vanlukkutryggingarráð, tann 29. september 2022, bað Landssjúkrahúsið um fullfíggjaða journal hjá skadda, og at ráðið, tann 12. januar 2023, minti Landssjúkrahúsið á

málið. Ráðið fekk fyrst fullfíggjaðu journalina tann 18. januar 2023, sum er næstan tríggir mánaðir eftir, at biðið var um hana.

Harumframt sást, at Føroya Vanlukkutryggingarráð, tann 14. februar 2023, bað Landssjúkrahúsið um serlæknaváttan av heilsustøðuni hjá skadda í táverandi løtu, og at ráðið, tann 25. juli 2023, minti Landssjúkrahúsið á málið. Ráðið fekk tó ikki serlæknaváttanina fyrr enn tann 27. september 2023, sum er 7,5 mánaðir eftir, at biðið varð um hana.

Haraftrat sást, at Føroya Vanlukkutryggingarráð, tann 17. oktober 2023, bað Landssjúkrahúsið um serlæknaváttan, men at Arbeiðs- og brunaeftirlitið fyrst, tann 29. februar 2024, móttók serlæknaváttanina, dagfest 27. februar 2024, sum er meir enn fýra mánaðir eftir, at biðið varð um hana.

At enda sást, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið, tann 5. februar 2025, bað Landssjúkrahúsið um avrit av læknajournal og kunnaði borgaran um hetta.

**Viðmerkingar frá myndugleika og klagara**

Tann 16. januar 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Arbeiðs- og brunaeftirlitið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl umframt skjalayvirlit í málinum.

Tann 4. februar 2025 bað Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmannin um longda svarfreist við 14 døgum. Í umbønini um longda svarfreist gav Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum hesa kunning:

> "Tá Arbeiðs- og brunaeftirlitið um ársskiftið 2023/2024 yvirtók umsitingina av vanlukkutryggingarmálum frá Sorinskrivarinum í Føroyum, vóru umleið 400 fysisk mál yvirtikin.
>
> Tey virknu málini komu á nærgoymslu, meðan restin fóru á fjargoymslu. Málið hjá A var tíverri av misgávum sent á fjargoysmluna og hevur tað tí tikið longur tíð enn væntað, at finna tað málið og talgilda tað."

Tann 17. februar 2025 setti umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum soljóðandi uppfylgjandi spurningar:

> "...
> Umboðsmaðurin ynskir at vita, um tit hava nakran lista yvir, hvørji mál vóru virkin, tá yvirtøkan av umsitingini var um ársskiftið 2023/2024?
> Harumframt ynskir umboðsmaðurin at vita, hvussu tit tryggja, at onnur virkin mál ikki av misgáum eru send til fjargoymsluna?
> Biðið verður um, at frágreiðingin verður umboðsmanninum í hendi innan 2 vikur..."

Tann 18. februar 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> ***Frágreiðing um viðgerðina av málunum hjá A***
> A ... hevur í løtuni eitt aktivt arbeiðsskaðatryggingarmál hjá Vanlukkutryggingarráðnum:
>
> - F Arbeiðsskaði - A ... Málið stavar frá at tí skaðarakti datt tann 10 mai 2021 umborð á fraktskipinum ...
>
> **Viðgerðarstøðan**
> Tá Arbeiðs- og brunaeftirlitið yvirtók umsitingina av Føroya Vanlukkutryggingarráð í januar 2024, yvirtók stovnurin samstundis øll virkin mál frá Sorinskrivarinum í Føroyum.
> Málið hjá A var eitt av hesum og var tað tá tvey ár og átta mánaðir síðani skaðin var hendur.
> Meðan ábyrgdin fyri málsviðgerðina var hjá Sorinskrivarinum, vóru hesu stig tikin: ...
>
> Eftir at Arbeiðs- og brunaeftirlitið yvirtók umsitingina eru hesu stig tikin:
>
> 29. februar 2024: Serlæknaváttan frá ... yvirlækna í lungnasjúkum og intern medisin komin inn
> 6. apríl 2024: Fyrispurningur frá tryggingarmeklara ... innkomin
> 11. apríl 2024: Serlæknaváttan frá neurologi móttikin
> 11. apríl 2024: Fyrispurningur sendur til LS
> 16. apríl 2024: Svar frá LS um at skaddi hevur tíð til kanning tann 3. Juni 2024
> 16. apríl 2024: Kunning til ... um málsviðgerðastøðuna
> 6. november 2024: Serlæknaváttan innkomin
> 5. februar 2025: Umbøn um journal send til LS
> 5. februar 2025: Kunning til partar, um at umbøn um journal er send.
>
> **Hví er stígur komin í**
> Tá mál vera sett á stovn hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, verður málsviðgeri knýttur at málinum...
> *(Vegna sjúku og útskiftan av starvsfólki kom málið at liggja uttan málsviðgera í tíðarskeiðinum frá fyrst í september 2024 til fyrst í november 2024, mín viðmerking).*
>
> **Støðan**
> Sum tað seinasta málsviðgerðarstigið í málinum, hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið heitt á Landssjúkrahúsið um at útflýggja Vanlukkutryggingarráðnum journal, ið skal endaliga lýsa um skaðin hjá A er vorðin støðugur.
> Støða verður síðani tikin til um málið kann leggjast fyri Vanlukkutryggingarráðið við tilmæli, ella um tørvur er á at innheinta fleiri upplýsingar..."

Viðlagt frágreiðingini var eisini eitt yvirlit yvir málsgongdina umframt øll skjøl og skjalayvirlit í málinum.

Tann 19. februar 2025 setti umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum soljóðandi uppfylgjandi spurningar:

> "...
> Tit hava tó ikki í hesi frágreiðing nevnt, at málið av misgáum var sent á fjargoymslu, hvussu leingi tað hevur ligið har, og hvørja ávirkan hetta hevur havt á málsviðgerðartíðina.
> Umboðsmaðurin ynskir tí at vita, í hvørjum tíðarskeiði málið hevur ligið á fjargoymslu, og hvat er hent í málinum tað tíðarskeiðið.
> Biðið verður um, at frágreiðingin verður umboðsmanninum í hendi innan 14 dagar..."

Í tíðarskeiðnum 4. mars 2025 – 12. mars 2025 minti umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið fýra ferð á at svara uppfylgjandi spurningunum, ið settir vórðu tann 17. og 19. februar 2025, uttan svar.

Tann 18. mars 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi kunning:

> "...
> Her er tíanverri hend onkur álvarsom villa hjá okkum, soleiðis at umboðsmaðurin ikki hevur fingið svar. Eg skal bera so í bandi, at tit fáa svar í vikuni..."

Tann 24. mars 2025, eftir at umboðsmaðurin enn ikki hevði fingið svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, sendi umboðsmaðurin landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum skriv um at taka neyðug stig til at fáa umboðsmanninum umbidnu svarini stundisliga.

Tann 25. mars 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "...
> - Út frá yvirlitinum yvir aktivu málini blivu hesi málini stovnaði og málsviðgjørd víðari í skjalaskipanini hjá stovninum (Skjalahald). Í fleiri av málunum var ikki neyðugt at skanna gamla málið inn fyri at halda áfram við málsviðgerðini, eftirsum tað var greitt, hvat næsta stig í málsviðgerðini var. Hetta var støðan við viðkomandi máli hjá A.
> - í nøkrum fáum førum er tað komið fyri, at aktiv mál eru pakkaði í kassar við liðugt viðgjørdum málum. Málið hjá A er eitt av hesum málunum.
> - Tá Løgtingsins Umboðsmaður bað um avrit av skjølunum í málinum, í sambandi við klaguna hjá A, bleiv tað uppdagað, at málið ikki var millum málini í arkivrúminum í skrivstovubygninginum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum..... Seinni bleiv málið funnið á fjargoymsluni hjá stovninum.
>
> Málið hevur tískil ligið á fjargoymsluni frá tí at málini blivu flutt frá dómaraskrivstovuni í januar 2024 til februar 2025, tá Løgtingsins Umboðsmaður bað um avrit av skjølunum. At fysiska málið hevur ligið á fjargoymsluni, hevur tískil ikki havt nakra ávirkan á sjálva málsviðgerðina av málinum."

Tann 21. mai 2025 var frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Sama dag, tann 21. mai 2025, sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar viðvíkjandi sínum inntøkumissi.

Tann 22. mai 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av málinum.

Tann 2. juni 2025 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar, har hann vísti á sítt ónøgdsemi við, at málið hevði ligið virkið í tvey ár og átta mánaðir, og metti ikki, at málið var torgreitt. Hann vísti á, at har vantaðu upplýsingar um, hvussu ofta og yvir hvussu langt tíðarskeið hann var sendur millum kommunulækna og sjúkrahús, og at har vóru fleiri serlæknaváttanir, ið ikki vóru umrøddar.

Tann 10. juli 2025 spurdi umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið, um nakað meir var hent í máli klagarans, síðan hann, tann 5. februar 2025, fekk kunning frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, at Landssjúkrahúsið var biðið um at senda avrit av læknajournal, og um klagarin hevði fingið nakra kunning frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum síðani 5. februar 2025.

Tann 11. juli 2025 svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at meira ikki var hent í málinum, men at tey, tann 10. juli 2025, høvdu mint Landssjúkrahúsið á at senda avrit av læknajournal, sum umbiðið, tann 5. februar 2025.

**Klaga 2**
**Málslýsing**
Av skjølunum, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi umboðsmanninum, sást, at klagarin tann 5. desember 2024, tann 15. januar 2025, tann 23. januar 2025, tann 30. januar 2025 og tann 6. februar 2025 setti Arbeiðs- og brunaeftirlitinum fyrispurningar um gongdina í málinum og rykti eftir endaligari avgerð.

Tann 7. februar 2025 svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið klagaranum og upplýsti, at mál klagarans var sett á skrá til komandi fund hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð, sum væntandi fór at verða í viku 8. Arbeiðs- og brunaeftirlitið bað eisini um umbering fyri longu svartíðina.

Av skjølunum, sum klagarin sendi umboðsmanninum, sást, at klagarin, tann 21. februar 2025, sum var í endanum av viku 8, tá fundurin skuldi vera, skrivaði til Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at hann væntaði at hoyra frá teimum sama dag, nú vika 8 var at enda komin. Hetta skjalið var ikki at finna í skjølunum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Eisini sást av skjølunum, sum klagarin sendi umboðsmanninum, at sama dag svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið klagaranum, at fundurin var útsettur vegna mannfall. Heldur ikki hetta skjalið var at finna í skjølunum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

At enda sást av skjølunum, sum klagarin sendi umboðsmanninum, at klagarin, tann 24. februar 2025, spurdi Arbeiðs- og brunaeftirlitið, nær fundurin so fór at verða. Heldur ikki hetta skjalið var at finna í skjølunum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Tann 27. februar 2024 kunnaði klagarin Arbeiðs- og brunaeftirlitið um, at klagarin fór at venda sær til Løgtingsins umboðsmann.

**Viðmerkingar frá myndugleika og klagara**
Tann 4. mars 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Arbeiðs- og brunaeftirlitið biðið um at lata umboðsmanninum skjalayvirlit í málinum.

Tann 26. mars 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Vísandi til klagum um okkara mál: *G Vinnusjúka - E - ...*
>
> Í stuttum er talan um eitt mál um vinnusjúku, ið upprunaliga er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum í 2023. Arbeiðs- og brunaeftirlitið gjørdi endaligt tilmæli um meinstig til Vanlukkutryggingarráðið í málinum 26. juni 2024. Aftaná hetta bleiv málið gjørt klárt til at fara á fund í Vanlukkutryggingarráðnum.
>
> Vísandi til at ongir fundir vóru í Vanlukkutryggingarráðnum frá síðst í juni til oktober 2024, og at ráðið bert hevur havt eitt avmarkað tal av fundum síðan hetta, er málið enn ikki komi til støðutakan á fundi. Fyrst í februar 2025 fekk Havnar Arbeiðarafelag kunning um, at málið væntandi koma at næstan fundin, ið var settur á skrá til viku 8. Hesin fundurin bleiv tó avlýstur, og síðani hevur Vanlukkutryggingarráðið ikki havt fund.
>
> Vísandi til LM-045/2024 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) (Áseting um talgilt samskifti og fráboðan og broyting í krøvunum til samansetingina av Vanlukkutryggingarráðnum) (https://www.logting.fo/mal/mal/?id=11042), ið Løgtingið samtykti 17. februar 2025, fær Arbeiðs- og brunaeftirlitið frameftir, sum skrivstova, sjálv heimild til at avgreiða slík mál vegna Vanlukkutryggingarráðið. Væntandi verður endalig avgerð í málinum tískil send til hoyringar hjá skaðarakta og Vinnusjúkugrunninum innan 3 vikur.
>
> Hóast tað ikki hevur verið gjørligt hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum at avgreiða mál sum hesi skjótari, orsaka av m.a. fundarvirkseminum hjá Vanlukkutryggingarráðnum, er tað

> samstundis sera harmiligt at stovnurin ikki hevur havt neyðugu orkuna at svara skaðarakta og fakfelag hansara stundisliga aftur.
>
> ...”

Viðlagt frágreiðingini var eisini eitt yvirlit yvir málsgongdina umframt øll skjøl og skjalayvirlit í málinum.

Tann 7. apríl 2025 var frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 17. apríl 2025 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “...
> Vit hava ikki nakra viðmerking til sjálvt svarið, annað enn, at tað tykist sum tey leggja seg skerfløt fyri klaguna, og kann bara merkja at tað gevur meining at vit hava sett okkum í samband við tykkum.
> Viðheft er svar sum limur okkara hevur fingið frá Arbeiðseftirlitinum mikudag tann 16.04.25., hvar tað kann staðfestast at hann aftur er dottin 3 vikur niður!...”

Viðlagt viðmerkingunum var skriv, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði sent klagaranum tann 16. apríl 2025.

Tann 21. mai 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av málinum.

**Klaga 3**
**Málslýsing**
Av skjølunum, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi umboðsmanninum, sást, at arbeiðsskaðin varð fráboðaður tann 23. september 2022, men at málið enn ikki var endaliga avgreitt, tá klagan varð send umboðsmanninum tann 14. mars 2025, og heldur ikki, tá umboðsmaðurin móttók skjølini frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum tann 28. apríl 2025. Málið hevur sostatt verið virkið í áleið 2,5 ár uttan avgerð, sambært § 47 og 55 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini. Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi fyrst umboðsmanninum frá, at fyribilsavgerð, sambært § 57 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, varð send í hoyring hjá klagaranum tann 28. og 29. november 2024. Í skjølunum sást, at fyribilsavgerðin var dagfest 14. februar 2025. Tað sást tó ikki í skjølunum, at fyribilsavgerðin varð send klagaranum til hoyringar. Seinni greiddi Arbeiðs- og brunaeftirlitið frá, at talan var um ein feil, og at einans læknalig skjøl vórðu send klagaranum til hoyringar tann 28. og 29. november 2024, og at hetta var føst mannagongd. Fyribilsavgerð varð ikki send klagaranum fyrr enn tann 25. juni 2025.

Eisini sást, at klagarin, tann 4. desember 2023, spurdi um status í málinum og kunnaði um, at hann ynskti skjóta avgerð. Arbeiðs- og brunaeftirlitið svaraði, tann 5. desember 2023, at málið

var latið AES (Arbejdsmarkedets Erhvervssikring), tann 1. november 2023, til viðgerðar, og at tað fór at taka fleiri mánaðir hjá AES at viðgera málið, men at klagarin fór at frætta aftur, tá okkurt nýtt var at frætta. Arbeiðs- og brunaeftirlitið minti AES á málið, tann 16. februar 2024. Í skjølunum sást eisini, at málið enn lá hjá AES tann 6. februar 2025.

Harumframt sást, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið tann 29. november 2024 sendi læknaliga tilfarið, sum nýtt var í arbeiðsskaðamálið klagarans, til klagaran til hoyringar. Sama dag, tann 29. november 2024, svaraði klagarin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og vísti á, at, sambært læknaligu skjølunum, var einans ein sjúkraskriving hjáløgd. Klagarin sendi avrit av sjey eftirfylgjandi sjúkraskrivingum. Eisini gjørdi klagarin vart við, at har vantaði yvirlit yvir fleiri sjúkrahúsútskrivingar.

At enda sást, at klagarin í tíðarskeiðnum 9. apríl 2024 – 23. apríl 2024 samskifti við Arbeiðs- og brunaeftirlitið um mál sítt, har hann millum annað bað um at fáa eina avgerð. Tann 23. apríl 2024 svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at nógv mál lógu hjá AES, at tað ikki var gjørligt at veita serviðgerð av einum máli, og at tað heldur ikki var gjørligt at framskunda málsviðgerðartíðina hjá AES. Eisini varð upplýst, at málsviðgerðartíðin hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum varð longd orsakað av málsviðgerðartíðini hjá AES. Sama dag, tann 23. apríl 2024, skrivaði klagarin aftur til Arbeiðs- og brunaeftirlitið og vísti á, at hann ikki metti, at talan var um serviðgerð, men at har, sambært § 48, stk. 4 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, átti at verið veitt fyribils endurgjald. Tann 3. juni 2024 og tann 13. juli 2024 minti klagarin á málið, men fekk ikki svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum fyrr enn tann 16. juli 2024, sum var næstan tríggir mánaðir eftir, at klagarin, tann 23. apríl 2024, bað um fyribils endurgjald.

**Viðmerkingar frá myndugleika og klagara**

Tann 21. mars 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Arbeiðs- og brunaeftirlitið biðið um at lata umboðsmanninum skjalayvirlit í málinum.

Tann 31. mars 2025 bað umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið um at senda sær avrit av øllum skjølum í málinum.

Tann 15. apríl 2025 minti umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið á málið.

Tann 16. apríl 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum frágreiðing, har biðið varð um umbering fyri ov seint svar, og har víst varð á, at stór arbeiðsbyrða og forfall var orsøkin til seina svarið. Haraftrat varð upplýst, at løgfrøðingur fór at lýsa ivamál í málinum, og at frágreiðingin vónandi fór at fyriliggja tann 16. apríl 2025.

Viðlagt frágreiðingini var skjalayvirlit í málinum.

Sama dag, tann 16. apríl 2025, sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi nærri frágreiðing:

> "...
> Eg havi nú fingið eina lýsing av málinum frá løgfrøðinginum. Í stuttum er talan um eitt mál, har Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið avgerð um at biðja um vegleiðandi avgerð frá AES. Arbeiðsskaðin hendi 10. september 2022.
> Hetta var gjørt áðrenn umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnum var flutt til Arbeiðs- og brunaeftirlitið.
> Málið koyrir í tveimum sporum:
>
> **Sporið hjá AES:**
>
> AES fekk 1. november 2023 áheitan frá Vanlukkutryggingarráðnum um at gera vegleiðandi niðurstøðu í málinum. 6. februar 2025 móttók Arbeiðs- og brunaeftirlitið teldupost frá AES, har AES millum annað bað um at fáa øll ensku skjøl í málinum umsett til danskt. Svarfreistin til AES í hesum sambandi er 6. mai 2025. Sum er bíða skjølini eftir at blíva umsett av fasta tíðaranum hjá Vanlukkutryggingarráðnum, ið tíverri hevur nógvar líknandi uppgávur liggjandi.
>
> **Fyrbilsavgerð frá Vanlukkutryggingarráðnum:**
> Eftirsum 2 ára freistin at taka avgerð í arbeiðsskaðatryggingarmálum fór í september 2024, mælir Arbeiðs- og brunaeftirlitið í uppriti síðst í oktober 2024 til, at Vanlukkutryggingarráðið tekur eina fyrbilsavgerð um meinstig á 5%. Vanlukkutryggingarráðið tók undir við tilmælinum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum á fundi 11. november 2024.
> Fyrbilsavgerðin bleiv tískil fyrireikað til hoyring og send til hjá skadda, ... 29. november 2024.
> Tann 2. desember 2025 *(2024, mín viðmerking)* móttók Arbeiðs- og brunaeftirlitið hoyringarsvar frá skaðarakta, har hann sendi fleiri læknalig skjøl á polskum, ið hann metir geva eina øðrvísi mynd av hansara sjúkralegu enn tað hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og Vanlukkutryggingarráðnum. Tað er tó ilt hjá myndugleikanum at siga, eftirsum skjølini eru á polskum og mugu týðast til enskt. Arbeiðs- og brunaeftirlitið metir tískil, at málið má fyrileggjast Vanlukkutryggingarráðnum av nýggjum, áðrenn fyrbilsavgerðin kann takast. Spurningurin er eisini, um hesi skjølini koma at broyta avgerðina um at senda málið til vegleiðandi avgerð hjá AES.
> Eftirsum Vanlukkutryggingarráðið ikki hevur havt fund síðan í januar 2025, hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki havt møguleika fyri at leggja málið fyri ráðið. Nú nýtt Vanlukkutryggingarráð er valt, metir Arbeiðs- og brunaeftirlitið at kunna leggja hetta málið fyri ráðið av nýggjum innan 4 vikur.
>
> Umframt frágreiðingina omanfyri skal Arbeiðs- og brunaeftirlitið vísa á, at stovnurin ikki metir samskiftið og vantandi samskiftið við skaðarakta og umboðsfólkið, B, sum nøktað ella í trá við góðan fyrisitingarsið. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal vísa á, soleiðis sum stovnurin eisini fyrr hevur greitt Løgtingsins Umboðsmanni frá, at stovnurin síðan flytingina av vanlukkutryggingarmálum til stovnin hevur stríðst við ymiskum yvirskipaðum umsitingarligum avbjóðingum. Stovnurin er nú væl ávegis við at loysa hesar, men

> málsviðgerðin á vanlukkutryggingarøkinum er enn merkt av seinkingum.
>
> Leggjast skal afturat, at kunning til omanfyrinevndu partar verður fyrireikað og send sum skjótast..."

Tann 28. apríl 2025 lat Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 20. mai 2025 var frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Sama dag, tann 20. mai 2025, sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar.

> Klagarin greiddi frá, at hann var samdur í, at samskiftið og avgerð frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ikki hevði verið nøktandi. Harumframt vísti hann á, at tað ikki var rætt upplýst av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, at hann hevði fingið eina fyribilsavgerð tann 29. november 2024. Hann helt, at frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bar brá av, at tey ikki hava lisið samskiftið við klagaran rætt og ikki fyrihalda seg til sannleikan. Klagarin viðmerkti at enda, at svarfreistir ikki vórðu yvirhildnar.

Viðlagt viðmerkingunum var skriv frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til klagaran, tann 29. november 2024, um, at hann hevur rætt til innlit í tilfar, ið liggur til grund fyri avgerðum í málinum.

Tann 21. mai 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av málinum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið fekk samstundis kunning um, at møguligar viðmerkingar kundu gerast innan 14 dagar.

Tann 12. juni 2025 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar.

> Klagarin greiddi frá, at hann sama dag hevði fingið eina klagu frá skadda, sum hann umboðaði, um at avgerð enn ikki var tikin í málinum, og at líkasælan hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum var ótolandi. Hann metti, at málið vísti vantandi málsviðgerð, og helt tað vera skammiligt.

Tann 30. juni 2025 setti umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum uppfylgjandi spurningar, har millum annað stóð:

> "...
> Umboðsmaðurin sær ikki í skjølunum, at sjálv fyribilsavgerðin varð send klagaranum til hoyringar tann 29. november 2024.
> ...
> Umboðsmaðurin sær heldur ikki í skjølunum, at fyribilsavgerðin eftirfylgjandi er send klagaranum til hoyringar ella til avgerðar.

Umboðsmaðurin ynskir tí at vita, um og nær fyribilsavgerðin er send klagaranum til hoyringar, um og nær klagarin hevur latið Arbeiðs- og brunaeftirlitinum hoyringarsvar, og um og nær sjálv fyribilsavgerðin er send klagaranum.
...
Skaddi hevur, tann 29. november 2024, sent Arbeiðs- og brunaeftirlitinum hoyringssvar til læknaliga tilfarið, ið varð sent honum fyrr sama dag.
Í hoyringssvarinum ger skaddi vart við, at avrit av 7 sjúkraskrivingum vantaði umframt yvirlit yvir 2 sjúkrahúsútskrivingar. Hjálagt var avrit av vantandi skjølunum.
Umboðsmaðurin ynskir at vita, um og nær hesi avrit eru víðarisend AES í nýtslu í málsviðgerð teirra..."

Tann 4. juli 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi svar til uppfylgjandi spurningarnar:

"...
**Fyribils avgerð frá Vanlukkutryggingarráðnum**
Í frágreiðingini frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, dagfest 16. apríl 2025, bleiv upplýst umboðsmanninum, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði sent fyribils avgerð til hoyringar hjá skadda tann 29. novembur 2024.
Hetta er ein feilur, Arbeiðs- og brunaeftirlitið ynskir tí við hesum skrivi at nýta høvið at geva umboðsmanninum røttu upplýsingarnar.
Tann 29. novembur 2024 blivu einans tey læknaligu skjølini í málinum, sum grunda fyribilsavgerðina, send H, B og Trygd til hoyringar. Sostatt bleiv fyribils avgerðin ikki send.
Skjal 43 kallað "Fyribils avgerð", sum umboðsmaðurin eisini vísir til, bleiv stovnað á Skjalahaldi tann 28. novembur 2024. Talan var tó um eina kladdu, sum enn ikki var liðug. Tískil er skjalið, sum er sent umboðsmanninum, ikki eitt "liðugt" skjal.
Umboðsmaðurin spyr, um og nær fyribils avgerðin er send klagaranum til hoyringar. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal í hesum sambandi upplýsa, at fyribils avgerðin ongantíð bleiv send til hoyringar. Somuleiðis skal skoytast uppí, at tá talan er um eina avgerð ella fyribils avgerð um skaðabót fyri varandi mein, so er føst mannagongd, at einans læknalig skjøl í málinum (og tískil ikki avgerðin sjálv) verða send til hoyringar.
Umboðsmaðurin spyr somuleiðis, um og nær fyribils avgerðin bleiv send klagaranum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal í hesum sambandi upplýsa, at fyribils avgerðin av røttum bleiv send H, B og Trygd tann 25. juni 2025. Hendan avgerð og teldubrævið, sum bleiv sent málspørtunum tann 25. juni 2025, er viðfest.

**Hoyringssvar frá H**
Umboðsmaðurin vísir á hoyringssvarið frá H, dagfest 2. desembur 2025, og spyr, um innsendu skjølini í hoyringssvarinum eru víðarisend til Arbejdsmarkedets Erhvervssikring til málsviðgerð teirra.
Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal í hesum sambandi kunna um, at hesi skjøl eru send til Arbejdsmarkedets Erhvervssikring tann 3. juli 2025. Hetta teldubrævið er somuleiðis viðfest.
Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal vísa á, at mett verður ikki, at reaktiónstíðin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í ítøkiliga málinum er nøktandi. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal somuleiðis vísa á, soleiðis sum stovnurin eisini fyrr hevur greitt Løgtingsins umboðsmanni frá, at stovnurin síðan flytingina av vanlukkutryggingarmálum til stovnin hevur stríðst við

> ymiskum yvirskipaðum umsitingarligum avbjóðingum. Arbeitt verður miðvíst við at loysa hesar avbjóðingar, men málsviðgerðin á vanlukkutryggingarøkinum er enn sera merkt av seinkingum..."

Viðlagt teldupostinum var fyribilsavgerðin, dagfest 25. juni 2025, umframt telduposturin, ið varð sendur AES, við teimum læknaligu skjøl, sum klagarin vísti á í hoyringssvari sínum, tann 2. desember 2025, vantaðu.

**Klaga 4**
**Málslýsing**
Av skjølunum, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi umboðsmanninum, sást, at arbeiðsskaðin varð fráboðaður tann 27. september 2022, men at málið enn ikki var endaliga avgreitt, tá klagan varð send umboðsmanninum tann 26. mars 2025, og heldur ikki, tá umboðsmaðurin móttók skjølini frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum tann 28. apríl 2025. Málið hevði sostatt verið virkið í áleið 2,5 ár uttan avgerð, sambært § 47 og 55 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini. Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi umboðsmanninum frá, at fyribilsavgerð, sambært § 57 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, varð send í hoyring hjá klagaranum tann 16. apríl 2025. Seinni greiddi Arbeiðs- og brunaeftirlitið frá, at talan var um ein feil, og at einans læknalig skjøl vórðu send klagaranum til hoyringar tann 16. apríl. Fyribilsavgerð varð tikin og send klagaranum tann 23. mai 2025.

Eisini sæst, at læknaváttan (1) varð gjørd tann 6. juli 2022, og at Føroya Vanlukkutryggingarráð móttók læknajournal tann 24. november 2022. Føroya Vanlukkutryggingarráð móttók tó ikki læknaváttan (2) fyrr enn 21. august 2023, tá læknin fekk klagaran undir hond.

Harumframt sást, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið tann 19. september 2024 minti klagaran á at fara til kommunulæknan aftur í sambandi við, at nýggj støðumetan skuldi gerast. Sama dag, tann 19. september 2024, kunnaði klagarin umvegis telefon Arbeiðs- og brunaeftirlitið um, at hann var fluttur uttanlands og ikki visti, hvussu hann skuldi bera seg at í sambandi við støðumetan, tí hann metti tað ikki vera skilagott at fara til lækna uttanlands, sum ikki kendi til arbeiðsskaðamálið. Arbeiðs- og brunaeftirlitið bað tí klagaran um at senda teimum eina frágreiðing umvegis teldupost, og at Arbeiðs- og brunaeftirlitið skuldi kanna, hvussu málið skuldi handfarast, og at klagarin skuldi hoyra aftur. Av somu orsøk vórðu læknaligu skjølini ikki send kommunulæknanum í Føroyum. Tann 28. november 2024 bað Arbeiðs- og brunaeftirlitið klagaran um at fara til lækna í landinum, har hann búði, og sendi honum læknaligu skjølini. Tann 5. desember 2024 vendi klagarin sær aftur til Arbeiðs- og brunaeftirlitið og kunnaði um, at hann fór at koma aftur til Føroya til jóla, og at hann tí hevði fingið tíð hjá kommunulæknanum í Føroyum til støðumetan 19. desember 2024. Tann 12. desember 2024 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið læknaligu skjølini til kommunulæknan í Føroyum.

**Viðmerkingar frá myndugleika og klagara**
Tann 31. mars 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Arbeiðs- og brunaeftirlitið biðið um at lata umboðsmanninum skjalayvirlit í málinum.

Tann 31. mars 2025 bað umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið um at senda sær avrit av øllum skjølum í málinum.

Tann 16. apríl 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
>
> **Frágreiðing**
> Sambært skjalatilfarinum er talan um eitt arbeiðsskaðatryggingarmál, sum arbeiðsgevarin til at byrja við fráboðaði beinleiðis til Vanlukkutryggingarráðið 6. juli 2022, men sum síðani er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum rætt umvegis Betri Trygging 27. september 2022. Málsgongdin aftaná hesa fráboðan er, at skaðarakti er biðin um at fara til kommunulækna til nærri útgreining (læknaváttan II), og biðin um at fara aftur til kommunulæknan við jøvnum millumbilum, fyri at fáa staðfest um skaðin er støðugur. Hendan tilgongdin gerst eitt skifti eitt sindur ógreið, eftirsum skaðarakti flytir *(uttanlands, mín viðmerking).*
>
> Kommunulæknin staðfestir tó síðst í desember 2024, at skaðin enn ikki er endaligur. Umsitingin metir tó í hesum sambandi, at neyðugt nú er at taka eina fyribilsavgerð, eftirsum 2 ára freistin er farin. Málið verður tískil fyrireikað og lagt fyri Vanlukkutryggingarráðið á fundi í januar 2024, har ráðið tekur undir við tilmælinum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Tíverri er hendan fyribilsavgerðin ikki avgreidd til hoyring fyrr enn 16. apríl 2025.
>
> Frágreiðingin uppá hesa seinking er, sum stovnurin eisini fyrr hevur greitt Løgtingsins Umboðsmanni frá í øðrum málum, at stovnurin síðan flytingina av vanlukkutryggingarmálum til stovnin hevur stríðst við ymiskum yvirskipaðum umsitingarligum avbjóðingum. Stovnurin er nú væl ávegis við at loysa hesar, men málsviðgerðin á vanlukkutryggingarøkinum er enn merkt av seinkingum.
>
> Umframt frágreiðingina omanfyri skal Arbeiðs- og brunaeftirlitið vísa á, at stovnurin ikki metir samskiftið og vantandi samskiftið við skaðarakta sum nøktað ella í trá við góðan fyrisitingarsið. Hetta harmast Arbeiðs- og brunaeftirlitið um..."

Tann 28. apríl 2025 lat Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 20. mai 2025 var frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Sama dag, tann 20. mai 2025, sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar, har millum annað stóð:

"...
Eg havi nakrar viðmerkingar til sjálva frágreiðingina.
Fyrst og fremst vil eg viðmerkja at tær umsitingarligu avbjóðingarnar hjá stovninum ikki hevur nakað við meg at gera, og eri eg ongantíð vorðin kunnaður um møguligar seinkingar vegna trupulleikar hjá stovninum, og har eg fyrst nú, tá eg sendi eina klagu inn, fái at vita at tað faktiskt eru seinkingar, tí stovnurin hevur trupulleikar. Aftur har kann eg freistast til at siga at eg, sum alt hetta málið snýr seg um, eri hildin fullkomiliga uttanfyri og vantandi samskiftið verður lýst týðiliga her. Um bíðitíðin hevði verið ein mánað og mann fekk kunning um alt hetta, so hevði tað kanska verið skiljandi, men aftur nú, so eru vit 10,5 mánaðar aftaná fyribilsavgerðin skuldi verða tikin, og eg fái at vita av hesum bara tí eg havi gjørt eina klagu til tykkum, at stovnurin hevur trupulleikar við umsitingini.
Eg føli meg veruliga sum eitt saksnummar, og ikki sum eitt menniskja, sum faktiskt havi verið úti fyri einari traumatiskari hending, sum hevur ávirkað gerandisdagin hjá mær og mínari familju fullkomiliga, og ger tað enn.

Tá tað kemur til... *(uttanlandsflyting, mín viðmerking)*, so er tað beinleiðis burturvið at brúka tað sum umskylning fyri at tað skal taka longri tíð... Tv.s at eg flutti... *(uttanlands, mín viðmerking)* meir enn 2 ár og tveir mánaðar aftaná skaðin hendi, og var har í fýra mánaðar. Haraftrat var eg hjá … *(kommunulækni, mín viðmerking).* Í jólaferiuni í desembur mánað 2024 til støðumeting, so tað kann ikki hava verið so ógreitt, sum frágreiðingin ljóðar til at verða. Hatta er ein umskylningur, og kann eg ikki taka nakað av hasum fyri fult.
Nú hava vit mai mánað, og tað gongur móti trimum árum síðani vanlukkan hendi, og eg havi framvegis ikki fingið nakra fyribilsavgerð senda til mín teldupost..."

Tann 21. mai 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av málinum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið fekk samstundis kunning um, at møguligar viðmerkingar kundu gerast innan 14 dagar.

Tann 3. juni 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"...
Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur ikki viðmerkingar til hvussu skaðarakti lýsir ella hevur upplivað málsgongdina í hesum málinum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið tekur undir við skaðarakta í, at málviðgerðin avgjørt ikki er nøktandi ella í trá við góðan fyrisitingarsið.
Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal tó vísa á, at hendan óhepna málsgongdin er ein avleiðing av yvirskipaðu avbjóðingunum sum stovnurin hevur havt av umsitingini av arbeiðsskaðatryggingarmálum.
Sambært journalskipanini er nevnda fyribilsavgerðin send skaðarakta 23. juni *(mai, mín viðmerking*) 2025..."

Tann 4. juli 2025, eftir at umboðsmaðurin gjørdist varugur við, at tað ikki sást í skjølunum, at fyribilsavgerðin varð send klagaranum til hoyringar, spurdi umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið um hetta.

Sama dag, tann 4. juli 2025, sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "...
> Tann 16. apríl 2025 blivu einans læknaligu skjølini í málinum send til hoyringar hjá D og Betri Trygging.
> Tann 23. mai 2025 bleiv fyribils avgerð send út við brævi, somuleiðis bleiv sama fyribils avgerð send Betri Trygging (hesin teldupostur er viðfestur) ..."

Viðlagt teldupostinum var fyribilsavgerðin, dagfest 23. mai 2025.

## 6. Fundur við Arbeiðs- og brunaeftirlitið um málsviðgerð og klagurnar

Vísandi til, at umboðsmaðurin yvir eitt lutfalsliga stutt tíðarskeið frá 14. januar 2025 til 26. mars 2025 fekk fýra klagur, sum allar snúðu seg um vantandi svar og langa málsviðgerðartíð hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, varð avgjørt at hava ein fund við Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Á fundinum varð umrøtt, hvør orsøkin var til, at borgarar annaðhvørt ikki fingu svar, ella ikki fingu svar innan rímiliga tíð, og hvør orsøkin var til, at málsviðgerðartíðin var so long. Fundurin var hildin tann 3. apríl 2025. Avtalað varð, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið skuldi senda umboðsmanninum yvirskipaða frágreiðing um vantandi svar og málsviðgerðartíðina fyri tey fýra málini.

Tann 13. apríl 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Sambært avtalu við Løgtingsins Umboðsmann skal Arbeiðs- og brunaeftirlitið við hesum lata umboðsmanninum eina yvirskipaða frágreiðing um støðuna viðvíkjandi viðgerðini av vanlukkutryggingarmálum sambært løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógin).
>
> Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal vísa á, at tilgongdin at flyta umsitingina av Vanlukkutryggingarráðið frá Dómaraskrivstovuni til Arbeiðs- og brunaeftirlitið er lýst í viðmerkingunum til LM-045/2024 *(Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) (Áseting um talgilt samskifti og fráboðan og broyting í krøvunum til samansetingina av Vanlukkutryggingarráðnum))*, ið Løgtingið samtykti 17. mars 2025.
>
> Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal í hesum sambandi eisini vísa á, at landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, ið varar av arbeiðsskaðatryggingarlógini, á tingfundi 10. apríl 2025 hevur svarað skrivligum fyrispurningi um Vanlukkutryggingarráðið frá Jenis av Rana, løgtingsmanni, eftir § 53 í Tingskipanini. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal tískil vísa til innihaldið í svarinum frá landsstýriskvinnuni, ið er lagt við hesi frágreiðing.

Sum svarið frá landsstýriskvinnuni greitt vísir á, hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið seinasta árið havt stórar avbjóðingar við at avgreiða vanlukkutryggingarmál innan eina hóskandi avgreiðslutíð. Hetta hevur havt við sær, at talið av aktivum málum er økt frá uml. 500 málum í januar 2024 til uml. 800 mál í apríl 2025. Avbjóðingarnar hava í høvuðsheitum staðist av:

- At læknin í Vanlukkutryggingarráðnum brádliga í apríl 2024 segði sessin frá sær. Eftirsum læknin í ráðnum er ein avgerandi partur av málviðgerðini hjá umsitingini og støðutakanini hjá Vanlukkutryggingarráðnum, og ongin varalimur tá var fyri læknan, kundi ein stórur partur av málunum ikki avgreiðast víðari fyrr enn ein nýggjur lækni bleiv valdur og settur inn í málsgongdirnar. Hetta hevði samstundis við sær, at fundarvirksemið hjá Vanlukkutryggingarráðnum lá stilt ein stóran part av várinum 2024. Harumframt lá fundarvirksemið hjá Vanlukkutryggingarráðnum eisini stilt orsakað av summarferiuni sama ár. Ráðið hevði tískil bert ein fund í tíðarskeiðinum frá fyrst í apríl 2024 til fyrst í oktober 2024. Aftaná hetta hevur ráðið bert havt einstakar fundir, soleiðis at ráðið frá 01. mars 2024 til 01. mars 2025 einans hevur havt 5 fundir.

- At langa tíðarskeiðið uttan lækna og uttan regluligar fundir í Vanlukkutryggingarráðnum hevur havt við sær, at sera nógv mál á ymiskum málsviðgerðarstigum støðgaðu upp, eftirsum umsitingin manglaði heimild og støðutakan til at kunna halda áfram við málsviðgerðini. Hetta hevði síðani við sær, at talið av áheitanum frá skaðaraktum og borgarum øktist í ein sovorðnan mun, at nærum øll tíðin hjá starvsfólkunum fór við at svara telefonuppringingum og teldupostum við ynski um at vita status í málum. Hetta forðaði so aftur starvsfólkunum í at avgreiða mál.
- At tørvurin á arbeiðsorku hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til at umsita arbeiðsskaðatryggingarlógin var mettur ov lágt frá byrjar av, soleiðis at ov fá starvsfólk vóru sett í starv til øki - t.e. eitt skrivstovufólk, ein løgfrøðingur og tvey lesandi.

Samanrenningin av hesum viðurskiftunum hevði líðandi við sær, at málini hópaðust upp, og tað bleiv verri og verri hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum at veita eina nøktandi tænastu.
Afturat hesum skal nevnast, at ein nýggj sjálvvirkandi telefonskipan, ið bleiv tikin í brúk í oktober 2024, gjørdi tað ov trupult at koma ígjøgnum til Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Hendan skipanin er síðani tikin úr brúk aftur, soleiðis at tað nú altíð er eitt fólk ið svarar høvuðstelefonini.

Fyri at venda gongdini eru niðanfyristandandi tiltøk sett í verk:

- Økið er uppraðfest soleiðis, at tríggir løgfrøðingar og tvey skrivstovufólk nú starvast burturav við vanlukkutryggingarmálum, umframt at fleiri onnur starvsfólk á stovninum hava ymiskar rakstraruppgávur.
- Telefonmóttøkan er skipað soleiðis, at vanlukkutryggingarmál hevur fingið sítt egna telefonnummar, ið svarar týsdag, mikudag og hósdag frá klokkan 10:00 til 12:00. Umvegis hetta nummarið fáa viðskiftafólkini beinleiðis fatur á einum skrivstovufulltrúa, sum kann svara ivamálum og fyrispurningum.
- Málsviðgerðin er skipað við greiðum mannagongdum, verkgongd í Skjalahaldi og freistum, soleiðis at tað altíð er greitt hvat málsviðgerðarstig málini liggja á.

- Starvsfólkini gjøgnumgingu í mars øll tey aktivu málini fyri at tryggja, at øll eru flokkaði rætt í trá við verkgongdina.

Í verandi løtu er talið av málum á ymisku málsviðgerðarstigunum soleiðis, sum víst er á í talvuni í skjal 1. Legg til merkis, at ikki øll mál skulu ígjøgnum øll málsviðgerðarstigini. Hetta er tengt at, hvussu væl málini eru upplýst frá byrjan av, og hvussu drúgv tilgongdin er at upplýsa málini.

Umframt hetta er arbeiðsskaðatryggingarlógin nú broytt soleiðis, at:

- Sorinskrivarin ikki longur skal virka sum forfólk ráðnum, men at annar løgfrøðingur kann veljast.
- Varalimir skulu veljast fyri forfólkið, læknan og ein av vanligu limunum.
- Skrivarin hjá ráðnum, ið nú skal hava eitt løgfrøðiligt embætisprógv, kann fáa heimild til at avgreiða flestu málini vegna ráðið.

Hesar broytingarnar koma at geva Vanlukkutryggingarráðnum eina munandi meira støðuga arbeiðsgongd og skunda undir avgreiðsluna av málum.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið roknar í hesum sambandi við, at myndugleikin komandi mánaðirnar kemur at avgreiða eitt munandi tal av málunum, sum liggja. Arbeiðs- og brunaeftirlitið tekur í sambandi við raðfestingina av málunum atlit til, at ávísir borgarar hava ein akuttan tørv á, at teirra mál blíva avgreidd.

Onnur átøk, myndugleikin kemur at fremja komandi tíðina, eru m.a.:

- Dagføra heimasíðuna hjá stovninum soleiðis, at meira og betri kunning um arbeiðsskaðatryggingarøkið er at finna. Hetta umfatar eisini kunning um væntaða málsviðgerðartíð v.m.
- Íverkseta ein tænastuportal á Vanganum, har borgarin altíð kann síggja status í sínum vanlukkutryggingarmáli.
- Senda kunning til øll fólk, ið hava eitt vanlukkutryggingarmál, um at málsviðgerðartíðin er long.

Fyri at taka saman um, skal Arbeiðs- og brunaeftirlitið staðfesta, at stovnurin avgjørt ikki metir at gongdin seinasta árið er nøktandi ella í tráð við góðan fyrisitingarsið. Hetta er bæði galdandi fyri málsviðgerðartíðina, sum er alt ov long, og kunningina til tey skaðaraktu, ið hava sett seg í samband við myndugleikan.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið er tó somuleiðis av teirri fatan, at stovnurin nú hevur neyðugu heimildirnar og starvsfólkaorkuna til at gera munandi batar í málsviðgerðini, soleiðis at hendan kemur í eitt nøktandi støði..."

Viðlagt frágreiðingini var eisini eitt yvirlit yvir, hvussu Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði býtt málini upp og raðfest tey frá mars 2025.

## 7. Aðrar klagur og fyrispurningar

Í tíðarskeiðnum 12. mai 2025 – 17. juni 2025 móttók umboðsmaðurin tvær aðrar klagur um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, sum umboðsmaðurin valdi ikki at taka til viðgerðar orsakað av, at umboðsmaðurin longu var í ferð við at viðgera klagur um somu viðurskifti.

## 8. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum málum snýr seg um málsviðgerðina og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við fýra mál um arbeiðsskaða.

**Málsviðgerðartíðin**

Í fyrisitingarlógini eru ikki almennar reglur um málsviðgerðartíðina hjá almennum myndugleikum. Sambært góðum fyrisitingarsiði, skulu mál tó altíð viðgerast innan rímiliga tíð, og viðgerðin má ikki gerast óneyðuga drúgv. Hvat rímilig viðgerðartíð er, má metast í mun til slagið av málum, myndugleikin umsitur. Haraftrat kann arbeiðsorka og talið av málum hava ávirkan á málsviðgerðartíðina og kann vera umberandi orsøk fyri langari málsviðgerðartíð.

Sambært § 48, stk. 2 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, skal avgerð um mist vinnuføri um møguligt takast innan eitt ár og í seinasta lagi tvey ár eftir skaðafráboðanina.

Er avgerðin ikki tikin innan freistina í stk. 2, skal Vanlukkutryggingarráðið játta tryggjaða eitt fyribils endurgjald fyri mist vinnuføri, sambært § 48, stk. 4 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Somuleiðis skal ein avgerð um varandi mein um møguligt takast innan eitt ár og í seinasta lagi innan tvey ár eftir skaðafráboðanina, sambært § 56, stk. 2 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Er avgerð ikki tikin samsvarandi stk. 1 og 2, kann forskot á skaðabót fyri varandi mein veitast, til endalig avgerð fyriliggur, sambært § 56, stk. 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Í teimum trimum klagunum, 1, 3 og 4, ið snúðu seg um málsviðgerðartíð, sást í skjølunum, at málini høvdu verið virkin í meir enn tvey ár og sjey mánaðir uttan endaliga avgerð ella fyribilsavgerð. Í klagu 3 og 4 varð fyribilsavgerð tó tikin ávikavist tvey ár og níggju mánaðir og tvey ár og sjey mánaðir eftir, at skaðin varð fráboðaður. Í klagu 1 sæst ikki í skjølunum, at fyribilsavgerð er tikin. Tað sýnist tí, at hetta eina málið sostatt hevur verið virkið í yvir fýra ár uttan endaliga avgerð ella fyribilsavgerð.

Eisini sást, at partar av longu málsviðgerðartíðini í øllum trimum málunum skyldaðist málsviðgerðartíð hjá lækna og Sjúkrahúsverkinum í sambandi við at fáa serlæknaváttanir og læknajournalar til vega.

Harumframt sást, at málsviðgerðartíðin í eina málinum lutvíst skyldaðist, at málið var sent AES og hevur liðið har síðan 1. november 2023.

Bíðitíð hjá heilsuverkinum og AES eru eftir míni meting umberandi orsøkir, ið ikki skyldast málsviðgerðini hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð ella Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Partar av longu málsviðgerðini skyldast eisini, sambært frágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, tann 13. apríl 2025, umstøður í sambandi við, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið yvirtók umsitingina av arbeiðsskaðamálum frá Sorinskrivaranum í Føroyum í januar 2024. Sambært frágreiðingini, hevur yvirtøkan havt við sær stórar avbjóðingar at avgreiða vanlukkutryggingarmál innan eina hóskandi avgreiðslutíð, sum hevur ført við sær, at talið av virknum málum er økt frá áleið 500 í januar 2024 til áleið 800 í apríl 2025.

Harumframt skyldast langa málsviðgerðartíðin, sambært somu frágreiðing, at læknin í Vanlukkutryggingarráðnum segði sessin frá sær í apríl 2024, sum hevði við sær, at ein stórur partur av málunum ikki kundu avgreiðast, fyrr enn nýggjur lækni var valdur og settur inn í málsgongdirnar. Hetta viðførdi, at fundarvirksemið í Vanlukkutryggingarráðnum lá stilt ein stóran part av várinum 2024. Harumframt kom summarfrítíðin stutt eftir, sum eisini hevði við sær, at fundarvirksemið lá stilt. Vanlukkutryggingarráðið hevði tí einans ein fund í tíðarskeiðnum apríl 2024 – oktober 2024. Eftir hetta hevur ráðið bert havt fýra fundir fram til mars 2025.

At enda hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið í frágreiðing, tann 16. apríl 2025, í sambandi við einu klaguna greitt frá, at skjøl í málinum, sum skulu týðast frá øðrum fremmandamáli og latast AES, bíða eftir fasta týðaranum hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð, sum hevur nógvar líknandi uppgávur liggjandi.

Sambært skjølunum í eina málinum, bað Arbeiðs- og brunaeftirlitið, tann 5. februar 2025, Landssjúkrahúsið um avrit av læknajournal.
Tá umboðsmaðurin, tann 10. juli 2025, spurdi Arbeiðs- og brunaeftirlitið, um nakað meir var hent í hesum máli, svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at onki meira var hent, men at tey, tann 10. juli 2025, høvdu mint Landssjúkrahúsið á at senda avrit av læknajournal.

Tað er eftir míni meting als ikki nøktandi, at málini hava verið virkin í meir enn 2,5 ár, uttan at støða var tikin til fyribilsavgerð, sambært § 48, stk. 4 og § 56, stk. 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini. Serliga málið í klagu 1 sýnist, sambært skjølunum, at hava verið virkið í fýra ár, uttan at nøkur fyribilsavgerð er tikin ella umhugsað. Harumframt er tað als ikki nøktandi, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki hevur mint Landssjúkrahúsið á vantandi avrit av læknajournal, fyrr enn umboðsmaðurin spurdi, um nakað meir er hent í málinum.

Havast skal í huga, at arbeiðsskaðamál eru sera tung fyri tann skadda, tí hesin ikki er førur fyri at arbeiða og bíðar eftir einum møguligum endurgjaldi, ið eftir §§ 48 og 56 í

Arbeiðsskaðatryggingarlógini um møguligt eigur at vera avgreitt innan eitt ár og í seinasta lagi innan tvey ár. Myndugleikin eigur eftir míni meting í slíkum málum av sær sjálvum at umhugsa fyribilsavgerðir, um farið verður tvørtur um tvey ára freistina.

Eg gevi mær far um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið í frágreiðingini hevur ásannað, at málsviðgerðartíðin ikki hevur verið nøktandi seinasta árið, og at tørvurin á arbeiðsorku at umsita arbeiðsskaðamál varð mettur ov lágt frá byrjan av.

Eg gevi mær eisini far um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur greitt frá, at fleiri stig til at betra um málsviðgerðartíðina eru tikin. Millum annað eru fleiri starvsfólk nú sett at taka sær av vanlukkutryggingarmálum. Harumframt eru greiðar mannagongdir skipaðar fyri málsviðgerð og freistum, umframt íverksetan av einum tænastuportali á Vanganum, har borgarin altíð kann síggja status í sínum vanlukkutryggingarmáli.

Eg gevi mær harumframt far um, at broytingin í § 27, stk. 1 – 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini hevur við sær, at skrivarin hjá ráðnum, ið nú skal hava løgfrøðiligt embætisprógv, nú kann fáa heimild at avgreiða mál vegna Vanlukkutryggingarráðið. Hetta má væntast at føra við sær stytta málsviðgerðartíð.

Eg fari at geva Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum sum skrivstovu eina átalu fyri ikki stundisliga at hava umhugsað og viðgjørt spurningin um fyribils endurgjald ella forskot, sambært § 48, stk. 4 og 56, stk. 3 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, tá ið greitt varð, at tvey ára freistin í málunum hjá klagarunum fyri viðgerðartíð ikki kundi haldast.

Eg fari eisini at mæla Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til framyvir stundisliga at umhugsa og kanna møguleikan fyri fyribils endurgjaldi og forskoti, sambært § 48, stk. 4 og § 56, stk. 3, í Arbeiðsskaðatryggingarlógini, tá tvey ára freistin ikki kann haldast.

Harumframt fari eg at mæla Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til at umhugsa at økja um arbeiðsorkuna av týðarum, soleiðis at málsviðgerðin í hesum málunum ikki gerst óneyðuga drúgv, tí bíðað verður eftir týðarum.

**Vantandi svar og afturboðan**

Skyldan at svara borgarum er staðfest í góðum fyrisitingarsiði. Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur myndugleikin innan rímiliga tíð at svara borgara, sum vendir sær til myndugleikan. Í summum førum kann vera, at myndugleikin ikki fær givið borgaranum svar til spurningin. Hetta, tí greitt svar ikki fyriliggur enn. Í slíkum førum eigur myndugleikin innan rímiliga tíð at geva borgaranum eina afturboðan um, at myndugleikin enn ikki hevur eitt svar, men at borgarin fréttir aftur, tá svar fyriliggur.

Í klagu 2 sást í skjølunum, at klagarin ikki fekk svar í tveir mánaðir til eina fyrispurningin, sum hann setti Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, har hann spurdi um status og avgerð. Eisini minti hann fleiri ferðir í hesum tíðarskeiðnum á málið.

Í klagu 3 sást ikki í skjølunum, at klagarin nakrantíð fekk svar til fyrispurning, sum hann setti Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, har hann ynskti at vita, nær málið fór at verða tikið upp, og bað um fyribils útgjald. Tað sýnist, at hann einans fekk læknaligt tilfar sent, og síðani fyribilsavgerð.

Sambært frágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, skyldaðist vantandi svar til borgarar lutvíst, at ein nýggj sjálvvirkandi telefonskipan varð tikin í brúk í oktober 2024, sum gjørdi tað trupult at koma ígjøgnum til Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

Tað er als ikki nøktandi, at klagararnir í ávikavist klagu 2 og 3 ikki fingu svar innan rímiliga tíð. Hóast avgerðin ikki var klár, og klagararnir tí ikki kundu fáa greitt svar til allar fyrispurningarnar, átti Arbeiðs- og brunaeftirlitið at givið klagarunum eina afturboðan um, at avgerðin ikki var klár, og nær borgarin kundi vænta svar. Arbeiðsskaðamál eru tung fyri tann skadda, har talan er um endurgjald, sum tann skaddi vanliga bíðar leingi eftir. Tað er tí sera umráðandi, at borgarin fær kunning um mál sítt.

Eg gevi mær far um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið í frágreiðingini hevur ásannað, at kunningin til tey skaðaraktu, sum hava sett seg í samband við myndugleikan, ikki hevur verið nøktandi seinasta árið.

Eg gevi mær eisini far um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur tikið sjálvvirkandi telefonskipanina úr brúk aftur, soleiðis at eitt starvsfólk nú svarar høvuðstelefonini.

Eg fari at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri ikki at hava svarað borgarum innan rímiliga tíð.

**Drál í málsupplýsingini**

Sambært skjølunum, sendi klagarin í klagu 3 Arbeiðs- og brunaeftirlitinum hoyringssvar til læknaliga tilfarið, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi honum fyrr sama dag. Har gjørdi klagarin vart við, at har vantaðu fleiri sjúkraskrivingar og yvirlit yvir sjúkrahúsútskrivingar. Hesi skjøl vórðu ikki send AES fyrr enn umboðsmaðurin sjey mánaðir seinni í sambandi við klagumálsviðgerðina spurdi, um tey vóru send.

Eg undrist á, at hesi skjøl ikki vórðu send AES fyrr enn eftir, at umboðsmaðurin spurdi um hetta. Um talan var um skjøl sum vóru viðkomandi fyri viðgerðina hjá AES, áttu hesi stundisliga at verið send. Serliga havandi í huga, at málið bíðaði eftir vegleiðandi niðurstøðu frá AES, sum hevði biðið um at fáa øll ensk skjøl í málinum umsett til danskt.
Hetta er als ikki nøktandi, havandi í huga, at talan er um mál, ið hava eina drúgva málsviðgerðartíð og eru tung fyri borgaran.

Eg fari tí at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri drál í sambandi við fyrisitingarliga avgreiðslu av hoyringarsvarinum frá klagara.

**Ófullfíggjað skjalføring og skeivar upplýsingar**

Hóast ongin beinleiðis lógaráseting er, ið áleggur almennum myndugleikum at skjalføra upplýsingar og skjøl, so hava almennir myndugleikar skyldu at skjalføra. Skyldan at skjalføra er staðfest í góðum fyrisitingarsiði og fylgir óbeinleiðis av reglunum um innlit og almenn savnindi.

Undir málslýsingini er umboðsmaðurin vorðin varugur við, at skjøl í fleiri umførum ikki hava verið skjalførd ella ikki skjalførd rætt. Hetta hevur eftir øllum at døma havt við sær, at ófullfíggjaðar upplýsingar upprunaliga eru sendar umboðsmanninum undir klagumálsviðgerðini, herundir at fyribilsavgerð varð send í hoyring. Trupulleikin sæst eisini í sambandi við ymiskar dagfestingar, herundir nær fyribilsavgerð varð tikin.

Tað er ikki nøktandi, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki hevur nøktandi greidleika í síni skjalføring og kemur til at lata umboðsmanninum skeivar upplýsingar. Hetta viðvirkar til óneyðuga langa klagumálsviðgerð.

Eg fari at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri ófullfíggjaða skjalføring.

Eg fari harumframt at minna Arbeiðs- og brunaeftirlitið á at skjalføra øll viðkomandi skjøl í einum máli og at hava greidleika í síni skjalføring framyvir, so at tað altíð er lætt at fáa yvirlit yvir viðkomandi mál.

**Almenn kunning**

Havandi í huga tær avbjóðingar og longdu málsviðgerðartíð, sum hava staðist av yvirtøkuni til Arbeiðs- og brunaeftirlitið, haldi eg, at ein almenn kunning átti at verðið gjørd um væntaðu longdu málsviðgerðartíðina og orsøkina til hana. Á henda hátt kundu borgarar við arbeiðsskaðamálum verið nøktandi kunnaðir um støðuna í máli sínum, og kundi hetta helst eisini lætt um trýstið á stovnin.

Eg fari at mæla til, at slík kunning beinanveg verður gjørd, um hon ikki longu er gjørd.

**Sein svar til umboðsmannin**

Undir klagumálsviðgerðini hevur umboðsmaðurin í fleiri umførum ikki fingið svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum innan ásettu freistirnar.

Hetta er als ikki nøktandi og viðvirkar til longda klagumálsviðgerð.

Hóast eg gevi mær far um, at stovnurin hevur verið undir stórum trýsti í sambandi við yvirtøkuna av arbeiðsskaðamálunum, fari eg at minna Arbeiðs- og brunaeftirlitið á at svara

umboðsmanninum innan ásettu freistirnar. Er tað ikki gjørligt, er tað umráðandi, at biðið verður um longda svarfreist, innan upprunafreistin er úti.

**Samanumtikið**

Samanumtikið fari eg at geva Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av teimum fýra arbeiðsskaðamálunum og fari samsvarandi umboðsmanslógini § 10 at senda fráboðan um málið til Formansskap Løgtingsins, løgmann og landsstýriskvinnuna í Umhvørvismálum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður